# Jólaferðin sum fór í



*Teir royna at finna eina loysn fyri ferðafólkini, nú frosttoka hevur lagt seg yvir flogvøllin í Pristina – uttast vinstrumegin Muusa Ferati frá Mega Turist og Per frá FaroeJet í Kastrup. Ein kosovo-albani lurtar við áhuga, og tað ger unga kvinnan, Dahina somuleiðis*

**- Eg havi bert verið eina ferð í Kosovo tey seinastu seks árini, sigur unga kosovo-kvinnan Dafina. Árla leygarmorgunin ætlaði hon sær aftur at vitja síni kæru í Pristina. So langt kom hon kortini ikki av tveimum orsøkum, veðurfrøðiligum – og fíggjarligum!**

FLOGFERÐSLA
*Orð og myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kastrup:** Dahina var farin tíðliga upp henda morgunin. Hon skuldi so í øllum førum ikki verða ov sein til flogfarið.

Hon hevði fingið tann ótrúliga møguleikan at sleppa heim loftvegis til síni kæru nú beint undan jólum.

Takkað verið einum ótrúligum tilboði frá ferðaskrivstovuni "Mega Turist" og FaroeJet kundi Dahina nú sleppa heim til Kosovo munandi bíligari enn áður.

Hon var ein av teimum umleið 70 kosovo-albanunum sum tóku av hesum tilboðnum.

Frammanundan var ikki gjørligt at flúgva beinleiðis millum heimlondini bæði. Tá var neyðugt við millumlendingum, men í ár skuldi tað so verða beinleiðis – beinleiðis úr Kastrup til Pristina, høvuðsstaðin í Kosovo.

Einasta keðiliga við tilboðnum var helst tað, at tey máttu upp lantg áðrenn hønurnar ein slíkan leygarmorgun. Flogfarið skuldi fara kl. 5:45, so ein mátti vera í góðari tíð.

> *Spurnarteknið kundi týðiliga lesast í eygunum á ungu Dahinu: - Hvussu nú – sleppi eg yvirhøvur heim til Kosovo á jólum?!*

Men hvat er tað í mun til tað, tá tú aftur sleppur at síggja tíni kæru í heimlandinum?!

### Ódýrt og ómakaleyst

Sambært ferðaætlanini skuldi flogfarið F6 og ruta no. 503 fara úr flogvøllinum í Kastrup so tíðliga sum klokkan 5:45.

Í hesum døgum, tá trygdin er í hásætið og nógv fólk ferðast, ráddi um at vera í góðari tíð til at tjekka viðførið inn og til trygdareftirlitið.

Klokkan 4:35 skuldi byrjast at tjekka inn, men kl. 4:30 var lítið sum bendi á, at nakað slíkt fór at henda í bræði.

Frammanfyri diskin stóðu allir hesir ferðahugaðu kosovo-albanararnir, kvinnur og menn í øllum aldri. Og børn í hópatali.

Ein umboðsmaður fyri ferðaskrivstovuna Mega Turist, Muusa Ferati av navni, gekk runt og prátaði við ferðafólkini. Líkt er til at tey kenna hann og hann kennir tey. Hann er teirra maður her í Kastrup árla ein leygarmorgun stutt undan jólum.

Týðiligt er, at tey hava álit á honum og at tey samstundis eru takksom fyri henda møguleikan, sum hann hevur útvegað teimum fyri eini skjótari, beinleiðis og ódýrari ferð til heimlandið.

### Handklæði sum vøgga

Hóast tað er óhugnaligt tíðliga at fara frá húsum, út til Kastrup og so avstað kl. 5:45, so er ikki líkt til at tað sakar ferðafólkini so nógv. Gleðin um at sleppa heim vinnur á hesum vansanum.

Fólkini práta saman. Tey kennast óivað, og tí er hetta eitt gott høvi at fáa tey seinastu persónligu tíðindini. Kennast tey ikki, ja so kunnu tey í øllum førum deila gleðina við at sleppa heim, - heim undan jólum.

Børnini tykjast vera líka spent, og látast ikki um vón, hóast bíðitíðin má kennast teimum óendaliga long.

## FAKTA

**Kastrup-Pristina**

FaroeJet hevði gjørt avtalu við donsku ferðaskrivstovuna Mega Turist at flúgva eina ferð um vikuna millum bæði støðini. Fyrsta ferðin skuldi vera leygardagin 15. desember.

Í summar var ætlanin víðari at økja túratalið til tvær ferðir um vikuna.

Spurningurin er, hvat verður av hesi flúgvingini, nú føroyska felagið er farið av knóranum?